# Nýggjar fótbóltslógir

*Komandi ár verður roynd gjørd í ensku Premier League, sum ætlandi skal steðga seinkingum við frísparksstøður*

JÁKUP MØRK

Frá komandi kappingarárið at rokna vilja onglendingarnir hava spælararnar at skikka sær betur, tá teir eru á vøllinum.

Hesuferð verður lagt eftir seinkingunum, sum ofta íkoma, tá fríspørk skulu takast, har onkur spælari stillar seg ov nær bóltinum, so dómarin má biðja leikaran flyta seg, áðrenn frísparkið kann takast.

**Flyta bóltin fram**
Sum er eigur hetta at revsast við gulum korti, men alt ov ofta sæst dómarin bert veittra spælaran longu burtur, uttan at nøkur revsing verður givin.

Frá komandi kappingarári at rokna verður hetta tó broytt. Nýggja lógin, sum í fyrsta umfari verður roynd í Onglandi, gevur nevnliga dómaranum loyvi til at flyta bóltin 9,15 metrar fram á vøllin, umframt at leikarin, sum seinkar frísparkinum framvegis eigur gult kort.

Viðførir hetta, at bólturin verður førkaður inn í brotsteigin, er framvegis talan um fríspark, og ikki brotsspark.

**Ongin orsøk til ótta**
Talsmaðurin fyri ensku Premier League, Mike Lee, greiður frá, at talan er um eitt tiltak, sum altjóða fótbóltssamgongan, FIFA, leingi hevur havt í kvittanini. Skipanin hevur verið roynd á lægri støði eina tíð, og millum annað varð hon nýtt í steypakappingini hjá smærru feløgunum í Onglandi, Auto Windscreen Shield.

Fyri at meta, hvørt skipanin er nóg góð til fótbólt á hægsta støði, vil FIFA tó royna hana í onkrari av fremstu deildunum, og hava Onglendingar bjóða seg til.

Summi eru kanska bangin fyri, at hetta fer at elva til ruðuleika á vøllinum, tá talan eisini er um metingar hjá dómaranum, men hesum er Mike Lee als ikki bangin fyri. Í allari Auto Windscreen Shield kappingini varð bert neyðugt at nýta reglunar 6 ella 7 ferðir, tí leikararnir funnu skjótt út av, at tað ikki loysti seg at seinka fríspørkunum.

**Ongland gongur á odda**
Hetta er ikki fyrsta ferð, at Ongland gongur á odda, tá nýggj tiltøk skulu setast í verk innan fótbóltin. Fyri einum 20 árum síðani vóru onglendingar teir fyrstu, sum royndu seg við 3-stiga skipanini, har ætlanin var at minka um úrtøkuna fyri javnleikir, og hendan royndin eydnaðist somikið væl, at so at siga øll onnur lond eini tíggju ár seinni gjørdu av at fylgja ensku stigaskipanini.



*Onglendingar geva nú ávaring til leikarar, sum vilja seinka spælinum*

***Tilvildarliga vald mynd***



*Rúni Nolsøe varð besti tipparin higartil, tá hann um vikuskiftið gittið 12 dystir rættar*

# Gekst væl hjá Rúna

*Rúni Nolsøe fekk frægasta úrslitið higartil, tá hann setti rætti teknið út fyri 12 av teimum 13 dystunum*

JÁKUP MØRK

Sum skrivað í leygardagsblaðið okkara, so var veddingarmaður okkara hetta vikuskiftið liðskiparin á HB liðnum, Rúni Nolsøe.

Stóri spurningurin ta ferðina var, um Rúni var eins dugnaligur at gita, sum hann er á sjálvum vøllinum. Skal metast eftir úrslitinum hesu ferð, so er eingin ivi, tí Rúni megnaði at raka 12 av 13 úrslitum, og hetta má metast sum sera gott.

**Ein sikkur kiksaði**
Tað var bert í dysti nr. 11, Huddersfield-Stockport, at metingin hjá Rúna var skeiv.

Her hevði hann roknað við einum heimasigri, men tá avtornaði hevði Stockprt vunnið 2-0, og so var 13-talið av ongum.

**Tríggjar ferð 10**
Sum kunnugt, so eru 12 rættir dystir á seðlinum ikki tað sama, sum at vinningurin er fyri 12 røtt.

Rúni hevði bert 4 røtt U-tekn, og samlaða úrslit av vedding hansara varð, at hann hevði 3 røð við 10 røttum, sum tilsamans kastaðu 216 kr. av sær.

## Úrslitini um vikuskiftið

| Dystur | Úrslit | Tekn |
|---|---|---|
| 1 Aston-Villa-Sunderland | 1-1 | X |
| 2 Chelsea-Liverpool | 2-0 | 1 |
| 3 Everton-Arsenal | 0-1 | 2 |
| 4 Newcastle-Coventry | 2-0 | 1 |
| 5 Southampton-Leicester | 1-2 | 2 |
| 6 Tottenham-Derby | 1-1 | X |
| 7 West Ham-Middlesbrough | 0-1 | 2 |
| 8 Charlton-Ipswich | 1-3 | 2 |
| 9 Crewe-Bolton | 1-3 | 2 |
| 10 Huddersfield-Stockport | 0-2 | 2 |
| 11 Nottingham-Forest-Port Vale | 2-0 | 1 |
| 12 Swindon Barnsley | 1-2 | 2 |
| 13 Walsall Pourtsmouth | 1-0 | 1 |

**Vinningar:**

| | |
|---|---|
| 13 røtt | 1.000.000 kr. |
| 12 røtt | 7.455 kr. |
| 11 røtt | 408 kr. |
| 10 røtt | 72 kr. |

## Soleiðis veddaði Rúni

| Dystur | Tekn | U |
|---|---|---|
| 1 Aston-Villa-Sunderland | 1X | 1 |
| 2 Chelsea-Liverpool | 1X2 | **1** |
| 3 Everton-Arsenal | X2 | **2** |
| 4 Newcastle-Coventry | 1 | |
| 5 Southampton-Leicester | 1X2 | X |
| 6 Tottenham-Derby | 1X | 1 |
| 7 West Ham-Middlesbrough | 12 | 1 |
| 8 Charlton-Ipswich | 1X2 | 1 |
| 9 Crewe-Bolton | X2 | X |
| 10 Huddersfield-Stockport | 1 | |
| 11 Nottingham-Forest-Port Vale | 1 | |
| 12 Swindon Barnsley | X2 | **2** |
| 13 Walsall Pourtsmouth | 1X2 | **1** |

**Úrslit**

| | |
|---|---|
| Røtt í skipanini: | 12 |
| Røtt U-tekn: | 4 |

**Vinningar**

| | |
|---|---|
| 3 røð við 10 røttum | 216 kr. |

# Matematiskar garderingar

*Tipping: Við sonevndum matematiskum garderingum kann veddingarskipanin gerast enn tættari, men tú verður eisinni noyddur at gjalda fyri eyka trygdina*

JÁKUP MØRK

Verður hugt at veddingarseðlinum, sum verður nýttur, tá veddað verður við skipanunum hjá donsku Tipstænastuni sæst ein teigur, sum hevur frámerkið, Mat.

Hesin teigur verður nýttur, tá sonevndar matematiskar garderingar verða nýttar.

Ein matematisk gardering merkir í stuttum, at tú spælir allan veddingarseðilin umaftur, tó við einum broyttum tekni.

Hevur tú t.d. sett eitt sikkurt 1-tal við dyst nr. 1, ber til at seta t..d. eitt 2-tal, sum matematiska gardering.

Veddingarseðilin verður tá veddaður 2 ferðir. Eina ferð við 1-talinum og eina ferð við 2-talinum.

**Kostar**
Á henda hátt tryggjar tú tær fleiri garderingar, uttan at hetta gongur yvir trygdina í skipanini, men eyka trygdin viðførir eisini eyka kostnað.

T.d. kostar skipanin, U 4-6-100, 100 kr. at vedda. Verður ein matematisk gardering løgd afturat, verður kostnaðurin 200 kr. Tvær kostað 400 o.s.fr.

Tiskil verða hesar garderingar aloftast nýttar í smærru skipanunum. Hesar hava aloftast fáar garderingar, men harafturímóti gott garanti.

Sostatt fáast nakrar garderingar fyri ein rímuligan penga í hesum, samstundis sum trygdin fyri vinningum er sera góð. Væl at merkja um krossarnir eru settir á røttu støðini.




*Skal ein gardering vera matematisk, skal krossur setast í raðið við frámerkinum, Mat.*



## Viðmerking:

# LV-málið

Umsóknarfreistin til landsverkfrøðing er farin. Tað málið, sum tók seg upp í sambandi við eina ætlaða samanlegging av Strandfaraskipum landsins og Landsverkfrøðinginum tann 28. desember 1998, verður nú tikið upp til dóms.

Við hesi grein, sum eitt slag av "proseduru", gevi eg fyri mín part málið upp í hendurnar á tí politiska myndugleikanum til avgerðar. Eftirmetingin og tað, sum tá krevst, kann so koma seinni.

Saman við hinum deildarleiðarunum á stovninum havi eg lovað tí politiska myndugleikanum at styðja Hans Biskopstø, stjóra, at halda stovninum saman og at halda hann virknan, til avgerð fellur. Hóast stovnurin, sum vera man, er illa farin hetta hálvtannað árið, so hongur hann saman enn og flestu uppgávur eru røktar: "Mission accomplished!"

Sum greitt nærri frá niðanfyri, so snýr málið seg eftir míni fatan um ein leiðslutekniskan førning innan almennu umsitingina. Antin sleppa vit hesum førningi av hondum í óðum verkum ella viðgera vit hendan førningin við skili petti fyri petti í spurninginum um, hvønn part vit vilja menna og hvør partur skal verða ein "saga blot".

**Millum administrator og statsmann**
Leiðsla er at
• seta stevnu (málsetningar)
• loysa uppgávur
• seta orð á, hetta samstundis.

At standa fyri, at leiða, kann vera so mangt.

Vit nevna tað eina leiðsluuppgávu at "administrera" ein stovn. Hetta merkir stutt sagt, at stovnurin skal rekast uttan stórvegis tillagingar ella menning í sambandi við tær uppgávur, sum stovnurin er settur at røkja. Leiðslan skal hugsa seg um og brúka vanligt fakmál, tað veri seg jura, økonomi, sosialráðgeving, verkfrøði e.t.

Hetta slagið av leiðslu er tann minst krevjandi leiðsluuppgávan.

Er tað hinvegin neyðugt at menna stovnin í sambandi við tær uppgávur, sum hann er settur at røkja og skal hetta gerast við skili sæð í einum víðari høpi, so er neyðugt, at leiðslan hevur vilja og evni til at átaka sær part av statsmansleikluti. Leiðslan hugsar seg sjálvsagt um, men harafturat er neyðugt at arbeiða væl saman við øðrum pørtum av samfelagnum og at royna okkurt, sum ikki er roynt fyrr.

Tey orðini, sum sett vera á uppgávuna, skulu sjálvsagt eisini innihalda tað viðkomandi fakið, men harafturat krevst, at leiðslan hevur skil fyri atferðini hjá øðrum pørtum (atferðarlæran) og hevur skil fyri stovnsins virksemi í samanspæli við restini av samfelagnum (hugsar í "systemum").

Leiðslutekniskt er hesin parturin av leiðsluuppgávuni væl tann truplasti. Fæst leiðslan upp á hetta støði, kunnu vit siga, at stovnurin er ein "statsmanseind", sum er grundarlag undir góðum politiskum verki.

Ein statsmanseind í menning er ikki ein mans verk. Umstøður, tilvild, persónsamanseting, persónligir eginleikar, umsetningur, uppgávusamansetingar, organisering o.m.a. samvirka soleiðis, at ein statsmanseind búnast. Ein slík statsmanseind má tí roknast sum dýrt gull í tægu — eitt virði í samfelagnum, sum er vert at verja. Ein førningur, sum skal takast á nakkan fyri at berast longur framá vegin.

Hóast eingin statsmanseind í menning verður av einum persóni, so er ikki trupult hjá tí eina persóninum, sum ikki hevur vilja og evni til gott verk, at søpla tað dýra gullið eftir heilt stuttari tíð. Væl styttri tíð enn vit ofta halda vera møguligt.

**Tíðarskeiðini 1948-72 og 1988-94**
Grundað á liðiligheitina og styrkina í Landsverkfrøðinginum øll 50 árini bæði í vøkstri og í minking, ber illa til at koma uttanum, at stovnurin er ein statsmanseind. At onkur sigur stovnin vera ein stat í statinum og annar heldur tað illa bera til at hava ein so sterkan stovn undir einum stýri eru onnur orð fyri somu meining.

1. apríl 1948 var Mikkjal Helmsdal settur landsverkfrøðingur saman við heimastýrislógini. Høvuðsuppgávan var at vera "vegamálastjóri". Har vóru trý stór "men".

1. Landið hevði ikki nakað stevnumið um samferðslu við bili — tá brúktu vit bát
2. Vegabyggingin var eitt "sosialt" tiltak, har størri dentur var lagdur á inntøkumøguleikar hjá fólki enn vegirnar
3. Landið átti einki vegakervi. Umleið 50 kommunur áttu millumbygdavegirnar

Tað fyrsta "men'ið" var avgreitt í fíggjarárinum 1954/55, tá ið tann politiski myndugleikin setti kós um samferðslu við bili og setti fíggjarorku av til endamálið. Umstøður gjørdust til Landsverkfrøðingin at keypa maskinur og útgerð, men annars varð fíggjað ígjøgnum studningar til kommunalar vegir.

Stórur partur av okkara landsveganeti er bygt eftir einum leisti, har landsverkfrøðingurin í praksis mátti koma ásamt við hvørt einasta bygdarráð um hvønn smálut í sambandi við byggingina, tí formliga vóru tey byggiharrar.

Samstundis avvandust fólk við ta sosialu yvirvágina, soleiðis at tað nú fyrst og fremst var vegaprosjektið, sum skuldi fáast burturúr.

Í 1964 var tann fyrsta landsvegalógin sett í gildi, men ikki fyrr enn í 1972 fekk landið fullar heimildir og skyldur yvir landsveganetinum.

Hesi vilkor vóru ikki sørt av einum "manndómsprøva", har leiðsluvilji og leiðsluevni vóru sett á royndarbeinkin.

Síggja vit hetta í leiðslutekniskum høpi, so var ikki talan um at reka ella at tillaga nakað. Stevnumiðið — málið — var at menna vegakervið.

Skuldi vinnast framá, so mátti stovnurin bæði hugsa seg væl um og tosa við viðkomandi partar, bæði kommunalpolitikkarar og landspolitikkarar, áðrenn skjøtil var settur á eitt vegaprosjekt. Og ofta var tekniskt neyðugt at royna okkurt, sum ikki var roynt fyrr, antin tí ráðini vóru ring ella tí royndirnar ikki vóru til.

Hóast Mikkjal bar orð fyri ikki at siga so nógv, mátti stovnurin seta orð á sínar gerðir. Har mátti bæði tosast fak og har mátti hugsast um, hvussu hesin ella hin fór at taka hetta og hitt. Søgan í V4 um sandingin, sum ikki vildi lata gróthúshurðina upp og aftur, hvørja ferð ein bilur kom, man vera kend.

Har mátti eisini hugsast "system", soleiðis at stovnurin gjørdist ein partur av eini føroyskari "umsiting", umframt at stovnurin natúrliga kom at mynda byggivinnuna.

Hesin "manndómsprøvin" fyri stovnin er helst ein tann mest týðandi grundin til, at stovnurin gjørdist ein "statsmanseind".

Slíkar royndir kunnu vera tungar at byggja upp aftur frá botni.

Í 1988-94 var landið í eini kreppu. Ígjøgnum hesa kreppuna vísti stovnurin sína styrki undir nýggjari leiðslu at megna at halda landsvegakervið, leggja afturat og halda uppá gott fólk, hóast umsetningurin minkaði við 70%. Hetta verður ikki gjørt uttan í eini "statsmanseind". Vónandi koma vit ikki at uppliva eina slíka kreppu aftur.

At standa fyri eini slíkari "statsmanseind" og "bera førningin longur framá vegin" er ikki hvørs mans føri, hvørki sum aðalstjóri ella sum stjóri fyri stovninum.

**Stríðið um LV, 1998-2000**
Sum eg síggi støðuna, so kom tann politiski myndugleikin á jólum 1998 í eina óforskylta støðu, sum hann á ongan hátt kundi varða seg ímóti — í eina privatpolitiska fellu. Vit, sum varða av stovninum, sótu samstundis í eini fellu. Vit kendu gullið í tæguni, men høvdu ilt við at seta orð á heilt neyvt, hvat tað var, vit vildu verja.

Formliga er eingin ivi um, at tann politiski myndugleikin hevur rætt og skyldu til at gera tað, sum hann nú einaferð heldur tæna landinum best. Umframt tey formligu krøvini, er einasta krav til tann politiska myndugleikan, at hann arbeiðir við alment kendum argumentum.

Við semjuni millum løgmann og avvarðandi fakfeløg og seinni setan av fyribils stjóra og ynski um eina frágreiðing frá stovninum var politiskt signalerað, at vit á stovninum eisini skuldu røkja okkara part av uppgávuni — at geva tí politiska myndugleikanum eitt virðiligt mótspæl.

Tankar eru tonktir, bøkur eru lisnar, lærd fólk eru spurd, orð eru sett á, greinar eru skrivaðar, fyrilestrar hildnir, bøkur skrivaðar, starvsfólkafundir og óformligir kjakfundir hildnir o. s. fr.

Tann politiski myndugleikin hevur fingið sítt mótspæl. Í stríðnum hava vit, sum vera man, verið á kantinum av, hvat góður siður er at gera sum alment sett. Mær vitandi eru tó eingi ósannindi komin fram frá LV síðuni.

**Gullið**
Tann politiski myndugleikin hevði á jólum 1998 ikki stórvegis møguleikar at gjøgnumskoða, hvat var farið fram á embætisgólvunum, heldur enn hvørjar avleiðingar stóðust av.

Í dag, tann 28. apríl 2000, hevur tann politiski myndugleikin onga umbering fyri ikki at vita. Tað mesta veit hann, og hitt hevur hann havt ríkiligar møguleikar at spyrja um.

Tað dýra gullið — leiðslueindin - liggur tí í hondunum hjá tí politiska myndugleikanum við ábyrgd mótvegis veljaranum. Tann politiski myndugleikin hevur í dag onga grund til at søpla hendan arvin.

Fyri meg — og helst tey nógvu á stovninum við — sigi eg takk fyri dystin. Fær hesin dystur eitt úrslit, sum er gott fyri okkum øll, so eiga ymsu leikararnir – bæði vit, sum komu í hann uttan sjálvi at vilja tað, og tey, sum sjálvvald komu sær í hann – at liva við, at summar taklingar vóru rættiliga kontantar. Meg sjálvan hevur hetta lært ómetaliga nógv.



**Signabø tann 28. apríl 2000**
**Signar P. Heinesen**

*Deyðin er tað at søpla úr goymslum tað dýra gullið,*
*lata tað fjara í skríni, meðan tú góðsið goymdi.*
*Hevur tú einki at flýggja uttan ta tómu tægu,*
*ert tú ein deyður maður.*

*Her er munur á monnum.*

*Sig honum meira um arvin:*
*Virðir tú vit og vinskap*
*ræður tú orðum at ráða*
*roynist tú gesti góður*
*heldur tú brandin blankan*
*hevur tú lívsins skálir*
*manniliga at munni*
*og tømir tær tignarliga,*
*økir tú ættararvin.*

**Heðin Brú, brot úr Fedranna talu**

Av tí at onkur villa var í yrkingini leygardagin prenta vit hana umaftur

*1. mai 2000*

## Solidariska hugsjónin

Sosialismunnar alheims vinir
humanistiska fólkaræði í hásæti
ei fjøtraðir í tjóðbúna kalda
hægri skoða døtu rog synir
hugsjónarandin mæti
yvir fákunnuleikanumv valda.

Óteljandi andsmenni vinarskarin telur
sláa ring – brøðralags stevið
rættvísishugsjónin frama fremur
andaliga vakti hópurin velur
í hjarta framskygnartevið
frælsislogan ungdómur nemur.

Tann eitrandi líkasæla
brennið á sjálavsóknarbálið
borgarligi tvitni gjósturin kaldi
Hoyrið nú stríðshanan gala!
Svá geislar solidariski skáli!
Skamma stund – sosialisman fær valdið!

Einavaldsins eitrandi marglætisdagar
elitan og snákur við háborðs sita
tváa skarnið – nikkudukkur, frúur fínu
høgrarák og líkasæla úr køstinum kagar
lata seg doyva av kellingahita
mafia-gorlakkar draga somu línu.

Ríkmenni fleiri og fleiri í tali
mikla fjøldin, kúgað, traðkað, háðað
marglætisgudin hátt tilbiðja
ósolidariski hugburður sigrar á vali
hánasaða harkaliðið mistreysti sáað
svá spælidukkur og støðuleysu tiga.

Yvirstættsins tjóvagóðs kúgaðu krevja
men rótfest er trælalyndið
jú minni gera – tess meira fáa
skarn og reinleika saman vevja
luksusdýrini á hægsta tindi
drepandi líkasæla – hópin háða.

Tann árvakna, mergjaða stríðsblóma
sprænir sína andsfúsu megi
yvirstætsins rotinskap sjónliga síggja
Socialismunnar bjarging tó hóma!
Kammeratar! Stríðsfús á rættvísisvegi
sjálvsóknarandar – hástóru – flýggja.

Orðaskvaldur, líkasæla á borgarligum hesti
fær luksusdýrini at blóma
Fakfeløg – fólksins rættur og styrki
maktgreðingsins fíggindi versti
Stríðsbrandin hevja – kúgaðu til sóma!
Socialismunnar mætasta yrki.

Aðalverkfall! Í reyða stríðsbúnan lata!
deyðsdømdu høgrakreftir niðurbinda
Arbeiðarafjøldin sameind til verka
byrjað solidariska stríðið mæta!
Javnrættarbálið mikla kyndað!
Kammeratar! Vær verjum stríðsandan sterka!

**Sólmundur Joensen**